# Rósuhavið í Helviti * til jólar

**Til jólar verður fyrsta videolagið frá heavy-rokkarunum SIC, almannakunngjørt fyri tær, mær og restini av fjepparum kring bláa knøttin.**

**TÓNLEIKUR**
*Eyðun Müller Thomsen*

Í november mánaða í ár vóru dreingirnir í SIC, í Athen. Her bleiv fyrsta videolagið upptikið við einari manning uppá 19 fólk. Hetta var bæði innanfyri kamera, ljós, make-up o.a. Tveir langir dagar vórðu settir av til projektið og TUTL stuðlaði SIC við túrinum.

Maðurin aftanfyri upptøkurnar er Achilleas. Hann er sjálvir úr Grikkalandi, men hevur verkstað í London, har hann starvast fyri tað mesta. Hann hevur arbeitt við sera stórum videoprojektum áður. M.a. kann nevnast, special effects til Harry Potter og Charlie & The Chocolate Factory. Og so eina rúgvu av videologum fyri bæði Per og Pól. Og nú SIC.

Lagið, Rosegarden In Hell, er nr. 7 í røðini frá debutfløguni frá SIC, sum útkom síðst í februar 2007. Hon hevur fingið avbera góð og flott ummæli runt allan heimin.

*Eddie Jacobsen, guitaristur í SIC:*
»Tað hevur veri- ótrúliga spennandi og áhugavert seinastu tíðina fyri okkum í SIC. Og nú kunnu vit endiliga vísa okkara list á skíggjanum. Sjálvandi við stórari hjálp frá nógvum. M.a. plátufelagnum TUTL, sum stuðlar okkum stórt!. Videolagið verður ikki bara flott, men stílfult við nógvum kenslum. Bæði myrkum og ljósum«



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin skrið ella stormur av suðri og regn, seinnapartin stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin regn, annars támut veður ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, sunnunáttina minni vindur. Lítið ella einki avfall og hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 12 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 0 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 957 hPa. við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í dag - týsdag.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer móti Íslandi og dýpist nógv. Tað gevur væntandi storm á okkara leiðum hósmorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/12 kl. 06⁰⁰ – 07/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í desember: -7,2° - Mesti hiti máldur í desember: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 04/12 kl. 06⁰⁰ – 05/12. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 47 mm

## Tiltøk í Miðlahúsinum

**12. desember**
*Trapputing - Pedagogfelagið*

**15. desember**
*Musikskúlin*

**17. desember**
*Trapputing/Bitting um flogvøll*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

06. des. Mánin longst frá jørðini
09. des. Tendring
17. des. Fyrra kvarter
22. des. Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. Des | 07.41 | 20.06 | 06.41 | 19.06 | 06.56 | 19.21 | 09.41 | 22.06 | 10.41 | 23.06 | 05.56 | 18.21 | 04.56 | 17.21 | 07.56 | 20.21 | 08.56 | 21.21 | 07.26 | 19.51 | 08.41 | 21.06 |
| 12. Des | 08.29 | 20.53 | 07.29 | 19.53 | 07.44 | 20.08 | 10.29 | 22.53 | 11.29 | 23.53 | 06.44 | 19.08 | 05.44 | 18.08 | 08.44 | 21.08 | 09.44 | 22.08 | 08.14 | 20.38 | 09.29 | 21.53 |
| 13. Des | 09.15 | 21.38 | 08.15 | 20.38 | 08.30 | 20.53 | 11.15 | 23.38 | - | 12.15 | 07.30 | 19.53 | 06.30 | 18.53 | 09.30 | 21.53 | 10.30 | 22.53 | 09.00 | 21.23 | 10.15 | 22.38 |
| 14. Des | 09.59 | 22.21 | 08.59 | 21.21 | 09.14 | 21.36 | 11.59 | - | 00.38 | 12.59 | 08.14 | 20.36 | 07.14 | 19.36 | 10.14 | 22.36 | 11.14 | 23.36 | 09.44 | 22.06 | 10.59 | 23.21 |
| 15. Des | 10.41 | 23.01 | 09.41 | 22.01 | 09.56 | 22.16 | 00.21 | 12.41 | 01.21 | 13.41 | 08.56 | 21.16 | 07.56 | 20.16 | 10.56 | 23.16 | 11.56 | - | 10.26 | 22.46 | 11.41 | - |